KOLLAFJARÐAR SKÚLI

**Í Kollafjarðar skúla eru hesi størv leys at søkja skúlaárið 2018/2019:**

- Tvey størv vegna lærarar í ársfarloyvi
- Eitt, møguliga tvey tíðaravmarkað størv vegna niðursett tímatal og møguligar avlopstímar. Starvið vegna avlopstímar er helst parttíðarstarv, og tímatalið til tað starvið verður endaliga ásett eftir 1. oktober.

Skúlin hevur tørv á at seta lærarar við ymiskum førleikum, og vit sóknast eftir lærarum, ið eitt nú kunnu undirvísa í fylgjandi lærugreinum:

- Føroyskt í byrjanarundirvísing
- Støddfrøði, føroyskt, danskt, náttúru og tøkni og enskt í miðdeild
- ítrótt/svimjing og serligan tørv umframt flokslærarauppgávu.

Vit arbeiða støðugt við at menna skúlan, og vit sóknast eftir lærarum, ið eru eldhugaðir, nærlagdir, duga og vilja samstarva og samskifta og eru fakliga dugnaligir. Vit ynskja lærarar, sum áhaldandi vilja menna seg sjálvan, ikki ræðast nýggjar avbjóðingar og seta tollyndi í hásæti.

Tey, ið sett verða, skulu hava læraraútbúgving.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2. Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Kollafjarðar skúli er ein eitt-sporaður skúli við 9 árgangum. Vit arbeiða í trimum deildum við einum læraratoymi í hvørjari deild.

Í Kollafjarðar skúla ganga komandi skúlaár umleið 125 næmingar í 1. til 9. flokki. Uml. 15 lærarar fara at starvast í skúlanum.

---

Umsókn saman við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast við telduposti til Jón Højsted, skúlastjóra í seinasta lagi fríggjadagin 1. juni 2018 kl. 12.00 á hesa adressu: **jon.hojsted@skulin.fo**

---

Eru spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlastjóran, Jón Højsted, á tlf. 21 14 87 ella varaskúlastjóran Annu Rúnu Jakobsen á tlf.nr. 22 14 07.

Botnavegur 2 · 410 Kollafjørður
telefon 312550 · www.kol.fo · kol@kol.fo